# Brúkstreytir fyri Mínboks

(Útgáva 3.0)

Góði brúkari av Mínboks

Við at brúka Mínboks góðkennir tú samstundis treytirnar. Treytirnar standa niðanfyri í hesum skjali. Les tær væl.

Tørvar tær hjálp at (support) at brúka Mínboks, kanst tú seta teg í samband við brúkaratænastuna á tlf. 1881 ella teldupost: 1881@talgildu.fo

Vinaliga Gjaldstovan

## Stutt um Mínboks

Mínboks er sameindur partur av Vanganum. Mínboks er tín persónligi, tryggi og talgildi postkassi.

Gjaldstovan eigur og umsitur Mínboks.

Mínboks er atkomulig alt samdøgnið, allar dagar í árinum.

Tað er ókeypis at brúka Mínboks.

## Stovnan av Mínboks

Tá Mínboks verður stovnað, skal Gjaldstovan hava upplýsingar um teg. Í hesum sambandi skal Gjaldstovan hava fult navn, bústað, føðingardag, teldupostadressu og p-tal hjá tær.

Tú kann velja at skráseta seg sum dulnevndan, men tá er ikki vist, at virkir og stovnar kunnu senda skjøl til tín umvegis Mínboks.

Við stovnan av Mínboks góðtekur tú, at Mínboks kemur ístaðin fyri postútbering.

Við stovnan samtykkir tú eisini, at títt p-tal verður nýtt til at eyðmerkja teg mótvegis sendarum, soleiðis at til ber at tryggja, at sendarin sendur skjølini til rættan móttakara.

Tú gevur eisini Gjaldstovuni samtykki til at lata almennum stovnum, SDC (vegna føroysku peningastovnarnar) og føroysku tryggingarfeløgunum p-talið hjá tær. Orsøkin er, at hesir sendarar hava tørv á hesum upplýsingum fyri at vita, um tú skal hava skjøl í Mínboks ella skal hava skjøl sendandi við postútbering.

## Tín ábyrgd

Tú hevur ábyrgd av innihaldinum í tíni Mínboks og skal serliga ansa eftir, at Mínboks ikki verður nýtt til ólógligt, skaðiligt ella annað líknandi virksemi. Um tú verður varugur við slíka nýtslu, skal Gjaldstovan beinanvegin hava boð um tað.

Tú skal so hvørt kanna, um nýggj brøv, boð v.m. eru komin í tína Mínboks.

Brúkarin hevur sjálvur ábyrgd av skjølum, sum brúkarin strikar úr Mínboks.

## Ábyrgd hjá Gjaldstovuni

Gjaldstovan skal syrgja fyri, at brøv og onnur boð frá sendarum til brúkaran verða beind í Mínboks hjá viðkomandi brúkara.

Gjaldstovan skal reka skipanina á tryggan hátt.

Gjaldstovan skal syrgja fyri, at brøv og onnur boð verða goymd og varðveitt á tryggan hátt, og at brúkarin til eina og hvørja tíð hevur møguleika fyri at fáa atgongd til Mínboks.

Gjaldstovan hevur ikki endurgjaldsábyrgd fyri beinleiðis ella óbeinleiðis tapi, sum brúkarar hava í sambandi við nýtslu av Mínboks.

## Tagnarskylda

Starvsfólk hjá Gjaldstovuni og undirveitarum hjá Gjaldstovuni hava tagnarskyldu viðvíkjandi viðurskiftum, sum tey fáa kunnleika til í starvi sínum, sum umsitarar av Mínboks.

Tagnarskyldan merkir m.a., at starvsfólk ikki uttan loyvi frá tær ella uttan aðra gilduga orsøk hava rætt at lata øðrum upplýsingar, sum starvsfólk í sínum starvi hava fingið kunnleika til.

## Strikan av Mínboks

Tú hevur til ein hvørja tíð rætt at biðja um at fáa tína Mínboks strikaða. Hetta hevur við sær, at øll brøv og aðrar upplýsingar um teg verða strikaðar.

## Force majeure

Gjaldstovan hevur ikki ábyrgd av skaða, sum kemst av viðurskiftum, ið Gjaldstovan ikki hevur ávirkan á ella órímiliga kundi ætlast at hava møguleika fyri at verja seg ímóti.